# Pedagogar

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár.

**Vit søkja eftir 3 pedagogum at starvast millum 20 og 40 tímar um vikuna, við børnum í aldrinum 3 til 5 ár, 1 pedagog á 30 tímar viku við børnum í aldrinum 0 til 3 ár, at byrja 15. august 2006 ( ella eftir nærri avtalu )**

**Eisini søkja vit eftir einum vikari, sum vit kunnu heita á tá ið tørvur er á tí.**

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- Ein stovn í menning, hvar tú fært møguleikan at seta tín dám á dagligdagin.
- Ein vælvirkandi starvsfólkabólk.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi.
- 94 praktfull børn.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**

- Hevur góð samstarvsevnir.
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi.
- Skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur ábyrdarkenslu.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 10/16.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran Marjuna Lassen ella varðaleiðaran Súsannu Ziska á tlf. 455557

**Skrivlig umsókn við prógvi skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. juli 2006, kl.12.00**

Dr. Margrethu Barnagarður
Gerðagøta
Fo – 700 Klaksvík
T-post margretha@margertha.fo

## Fólk til pappír- og pappbilin "Rølik" hjá IRF

Søkt verður eftir einum fólki til pappír- og pappbilin "Rølik" hjá IRF, at byrja mánadagin 3. juli 2006, ella skjótast tilber.

Uppgávurnar hjá "Røliki" eru m.a. at:
· Heinta hvíta posan í IRF økinum
· Heinta pappír og papp frá virkjum og bingjuplássum í IRF økinum
· Umframt aðrar líknandi uppgávur

Tann ið settur verður í starv kann eisini rokna við øðrum uppgávum innan IRF.

Krøv til umsøkjaran:
· Stóra koyrikortið og vanur at koyra lastbil
· Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt

Galdandi sáttmáli:
Lønarsáttmáli fyri fastløntar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinasta lagi mánadagin 26. juni 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 47 33 00 ella 77 33 06, Jógvan Júst Olsen.

IRF
Postboks 39 · FO-520 Leirvík

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Dagrøktari til dagrøktina á Skála

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 14. august.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 442059 ella 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast mikudagin 28. juni 2006.

Runavíkar Kommuna

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

GSM telefonir &

GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar

Storno
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

## Frá Klaksvíkar havn

# Rudding við bátahylin í Árnafirði

Øll tey ið eiga nakað liggjandi við bátahylin í Árnafirði, verða biðin um at taka tað burtur innan 30. juni 2006, annars verður beint burtur fyri eigarans rokning.

**Klaksvíkar havn**

# Jørð í Gásadali til sølu

Hervið vera 2 gyllin jørð (matr. nr. 30) í Gásadali, Ryggsvíkin, seld, um hóskandi boð fæst. Hervið fylgir eitt stykki innangarðs við, sum er 494 m².

Áhugað kunnu ringja á

**tlf. 327130 ella 281130**
**helst aftaná kl. 18.00**



Rúslinjan
svarar á telefon 31 85 86

> Telefonráðgeving
> Anonymitet
> Tagnarskyldu
> Stundir at lurta

Bláí Krossur
www.blakross.fo